# Yggdrasil aftur á ferð úti í heimi

**Føroyski bólkurin Yggdrasil er aftur á ferð í útlondum og er m.a í Sveis í hesum døgum, har ummælini av bólkinum eru góð**



TÓNLEIKUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Yggdrasil er ein stak livandi bólkur á so mangan hátt. Hann eldist ikki nevnivert, er sera virkin og hevur verið tað í mong ár, manningin er ikki heilt støðug, og ikki minst, so er bólkurin sera ofta á ferð í útlondum.

Tað er hann aftur nú. Hesaferð er tað ikki á Hawai ella í Argentina, men í Sveis og har á leið.

Og vitjanin fer ikki framvið ómerkt. Miðlarnir gera burturúr. Blaðið stadt st. gallen hevur grein og mynd av bólkinum. Har verður sagt frá bólkinum og sangfuglinum Eivør, sum er við mikrofonina á ferðini. Gjølla verður greitt frá navninum Yggdrasil og norðurlendsku guðalæruni, um Eivør, føroyskan tónleik og tónleikaarv og um bólkin og tónleikin.

Og tað er ikki sørt, at bólkurin fær rós fyri framførslurnar á ferðini. Greinin, nevnd Faroer-Blues, er jalig og ger fitt burturúr at siga frá bólki, sangarinnuni Eivør, tónleikinum og Føroyum.

Nógvir bólkar hava sum fráliður vitjað í Sveits, eftir at Tutl fekk samband við fólk har, ið hava fingið áhuga fyri føroyskum tónleiki. Hetta er Roger Ray úr fløguhandlinum TonArt og starvsfelagi hansara í samband við føroyskan tónleik, Felix. Nevnast kann at t.d. Høgni Lisberg eisini hevur verið á ferð í Sveis. Manningin hesa ferðina er

Eivør Pálsdóttir sang
Villu Veski saxofon
Hedin Ziska Davidsen guitar
Kristian Blak piano
Mikael Blak bass
Brandur Jacobsen trummur

**Konsertskráin er henda næstu dagarnar:**
7. April 21.00
Porgy&Bess, Wien
www.porgy.at

8. April 21.00
Smaragd, Linz
www.smaragd.cc

9. April 20.30
Cafe Museum, Passau
www.cafe-museum.info

Roger Ray hevur sent okkum myndirnar úr Sveis og eru tær frá eini framførslu í St. Laurenzen kirkjuni í St. Gallen tann 3. apríl 2005.

P/F ALMA
MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA
Munters
THE HUMIDITY EXPERT

Munters produktini avfukta kølirúm, frystirúm og aðrar goymslur, produktiónshølir, teknikkrúm, turkirúm, garagur, loftsrúm og kjallarar við kondensrupuleikum, eins og onnur hølir har fukt ella kondens kann gera skaða, ella eitt turrari umhvørvi er eitt ynski ella krav.

Á Hjalla 15 – Boks 1338 – FO 110 Tórshavn
Tlf. 31 58 90 – Fax. 31 35 00 – mail: henrik@alma.fo





Bygningur til leigu ella sølu

Nú Sosialurin flytir av Argjum, verður bygningurin hervið lýstur til leigu ella sølu.

Bygningurin, sum stendur á Matr. nr 93, Argjavegur 26 á Argjum, er umleið 200 fermetrar til víddar í trimum hæddum, har tvær tær ovaru eru innrættaðar til skrivstovuhøli. Niðasta hæddin var upprunaliga innrættað til prentsmiðju, men hevur seinastu tíðina hýst einum bókavirki.

Grundøkið er 680 fermetrar til víddar. Á økinum er asfalterað parkeringspláss til 20-25 bilar.

Talan kann verða um eitt ella fleiri leigumál.

**Bygningurin verður seldur, um hóskandi boð fæst.**

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Eirik Lindenskov, stjóra, telefon 216409 ella eirikur@sosialurin.fo

**SP/F Húsið**

Sosialurin 341800

VINN EINA DREYMA FÓTBÓLTSFERÐ
FYRI 2 TIL FRAKLANDS, AT HYGGJA EFTIR DYSTINUM MILLUM FRAKLAND OG FØROYAR




**Fótbóltsferðin**
Í Fótbóltsblaðnum, sum var í Sosialinum undan páskum, er ein síða, har eitt puslispæl skal setast á. Tað verður talan um 15 puntar, sum skulu setast saman til eina mynd, og eru tveir teir fyrstu at siggja niðanfyri.
Tá allir puntarnir eru samlaðir, skulu hesir sendast Sosialinum.
**Loyvt er ikki at senda inn avrit av síðuni ella av puntunum, sum skulu setast á síðuna**